gult12 cyan12 magenta12 svart12



VB-KÍ:

# Klaksvíkingar eru kroystir

**Vágbingar, sum hava vunnið tvær ferðir, hava alt fólkið tókt, og hjá KÍ, sum hevur tapt tvær ferðir, er Jan Joensen við aftur**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Hóskvøldið fóru KÍ spælararnir um Suðuroyarfjørð við Norrønu. Ì dag skulu teir á vøllin vesturi á Eiðinum í Vági, og tað stendur nógv á. KÍ hevur tapt báðar teir fyrstu dystirnar, og tey seinnu árini hava teir ikki havt nøkur serlig úrslit at vísa á, tá teir hava spælt í Vági.

– Vit taka ein dyst í senn. Ímóti HB sýndu spælararnir góðan hugburð, og vit hava álit á, at tað fer at eydnast at fáa mál og stig. Men vit eru greiðir yvir, at tað verður strevið ímóti føroyameistarunum í Vági, sigur Karl Birgir Isaksen, sum er formaður í fótbóltsdeildin hjá KÍ.

Hjá klaksvíkingum er veteranurin Jan Joensen við aftur. Hann var leikbannaður ímóti HB. Símun Waag Høgnesen hevur trupulleikar við liðbandi í knænum, hann hevur ikki vant seinastu tíðina, og hann verður ikki við í dag.

### Allir tøkir

Í Vági er lagið gott eftir góða sigurin á Svangaskarði. Allir spælararnir eru tøkir, og sjálvsálitið er í toppi. VB hevur ikki tapt í landskappingini á heimavølli í meiri enn eitt ár.

– Síðsta tapið var í 2. umfari í fjør, tá B71 vann 1–0 her suðuri. Ta ferðina hevði VB so at siga alt spælið, men B71 vann. Hetta vísir, hvussu týdningarmikið tað er at uppgávurnar verða tiknar í álvara hvørja ferð, og at konsentratiónin verður varðveitt alla tíðina, heldur Óli Holm, formaður í VB.

– VB er føroyameistari, og á Vágs eiði spælir VB altíð sítt spæl. Men tað er týdningarmikið, at okkara spælarar ikki undirmeta KÍ, sjálvt um klaksvíkingar hava tapt teir báðar fyrstu dystirnar. Okkara spælarar hava hava nógvar royndir, og eg havi tað álit á teimum, at teir taka uppgávuna í tí álvara, sum skal til.

# Spennandi steypadystir

**Dystirnir dýra biðjudag verða avgerandi fyri, hvussu liðini í hálvfinaluni vera fyri sunnudagin**

HÁLVFINALUR
*Jóannes Hansen*

Hjá fótbóltsspælarunum er tað nógv at takast við og hugsa um í hesum døgum. Triðja umfarið í landskappingini er á skránni dýra biðjudag, og longu sunnudagin eru dystirnir í fyrru semifinaluni í kappingini um løgmanssteypið á skránni.

B36 og HB tørna saman í Gundadali, og KÍ og NSÍ skulu spæla í Klaksvík. Seinnu dystirnir í semifinaluni skulu sambært skránni spælast Kristi himmalsferðardag, sum er hósdagin 24. mai. Tá skulu havnafeløgini aftur spæla í Gundadali, meðan NSÍ og KÍ skulu spæla í Runavík.

Reglurnar siga, at um tað stendur á jøvnum eftir báðar dystirnar í hálvfinaluni, so telja málini, ið eru skorað á útivølli. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað er eitt betri úrslit fyri HB enn fyri B36, um dysturin teirra millum endar t. d. 1–1, sum báðar uppgerðirnar endaðu við í bólkaumfarinum.

Okkum kunnugt var undan triðja umfarinum í landskappingini eingin spælari leikbannaður í fyrru semifinaluni. Um nakar verður leikbannaður veldst um reyðu kortini í landskappingini. Reglurnar siga, at um spælari fær reytt kort í einum dysti, so er hann leikbannaður í næsta dystinum, uttan mun til um talan er um steypadyst ella landskappingardyst.

Finalan í steypakappingini verður sambært skipanini spæld ólavsøkudag, og hon verður spæld á Tórsvølli.

NSÍ-B68:

# Í NSÍ eru teir svangir

**Toftamenn hava vaskað talvuna reina og ætla at byrja av nýggjum, tá teir vitja grannarnar innanfyri**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Saman við álopsfelaganum í B68, Mortani Hansen, er Súni Fríði Johannesen uppvaksin í felagnum, sum hann nú skal royna seg ímóti*

Tað er grannauppgerð við Løkin í Runavík í triðja leikumfarinum. B68 vitjar, og tað er upplagt, at toftamenn eru kroystir. Teir hava undan kappingarbyrjan verið roknaðir ímillum bestu boðini upp á oddasessirnar, men teir heilkiksðu bæði í Gundadali ímóti HB og á heimavølli ímóti VB.

Í vikuni hava teir arbeitt við málinum. Teir hava so at siga vaskað talvuna reina, og í Runavík fara teir so at siga ar byrja av nýggjum. Teir rokna avgjørt ikki við nøkrum løttum dysti. NSÍ hevur havt takið á B68 tey seinnu árini, men tað skal telvast um stigini, áðrenn tað verður greitt, at B68 eisini hevur kiksað í triðju royndini í ár.

Oleif Joensen fekk reytt kort ímói VB, og hann er leikbannaður. Marcello Marcellino er framvegis skaddur. Hann er so smátt farin at renna fyri seg sjálvan. Teir rokna við, at hann kanska fer at venja saman við hinum í komandi viku.

Fremstu B68 álopsmenninir eru í løtuni Súni Fríði Johannesen og Mortan Hansen. Teir eru báðir uppvaksnir í NSÍ. Nú fæst at síggja, hvussu teir fara at standa seg ímóti gomlu liðfeløgunum.

### Allar kanónirnar tøkar

Í NSÍ eru teir svangir. Eftir javnleikin í fyrsta umfarinum vóru teir ikki á vøllinum í øðrum umfari, tí dysturin í Miðvági varð útsettur til mitt í komandi viku.

Tá NSÍ skuldi í Vágarnar var Jónstein Petersen so mikið illa fyri, at tað ikki varð roknað við, at hann fór at verða førur fyri at spæla. Mikukvøldið var hann til venjingar aftur, og tá varð roknað við, at hann fór at verða førur fyri at spæla ímóti B68.
Seinastu vikuskifti spældu onkrir av yngru monnunum, sum ætlanin hevði verið at hava við vestur í Vágar, við í 2. deild. Teir fóru á vøllin ímóti HB, tá tað vaar greitt, at dysturin í Miðvági varð útsettur.

# Herfølge hongur í

**Sunnudagin skal Jákup Mikkelsen syrgja fyri, at Todi Jónsson og hinir í FCK ikki fáa mál og vinna í Herfølge**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Mikukvøldið var síðsti dysturin í 27. umfarinum í superliguni á skránni. Í fínum summarveðri var Herfølge á Lyngby stadion. Prísurin á atgongumerkjunum var settur niður í helvt, og tað mundi vera ein av orsøkunum til, at 2.140 áskoðarar møttu upp. Liðini eru tey bæði í superliguni, sum hava minst tekki millum áskoðararnar, so tað var ikki so galið.

Úrslitið var 1–1. Lyngby kom á odda, tá tríggjar minuttir vóru farnir. Mikkel Bo Jensen royndi seg við fløtum skoti úr eitt sindur til vinstru í brotsteiginum, Jákup Mikkelsen tveitti seg og fekk hondina á, men bólturin fór í handara síðunetið.

Herfølge var ágangandi, og teir høvdu bóltin nógv. Men tað eydnaðist teimum bara at fáa eitt mál. Tað restaðu fimm minuttir av fyrra umfarinum, tá Dennis Conteh javnaði.

Síðstu løtuna vóru teir í Lyngby bara tíggju, tí ein av teirra monnum, Ulrich Vinzents, fekk reytt kort fyri sera ófantaliga takling.

John Faxe Jensen iðraði seg um, at Herfølge ikki fekk øll stigini, sum hann helt, at teir kanska høvdu havt uppiborið at fingið. Men hann segði seg frøðast um, at hugburðurin hjá hansara monnum tóktist vera tann rætti. Teir høvdu góðan íblástur, og stírðsviljin lýsti av teimum. Hetta helt venjarin kann bera við sær, at teir fara at megna at lyfta seg upp um strikuna.

### Todi vitjar

Komandi sunnudag verður talan um torføra uppgávu hjá Herfølge. Jákup Mikkelsen skal gera sítt ítarsta fyri at halda tætt ímóti Toda Jónsson og FCK. Kanska ein eitt sindur undarlig støða fyri Herfølge málverjan. Um tað verður til tað, at hann seinni í summar flytir til FCK, so kann tað vera, at hann ikki kemur til eitt meistaralið, tí hann nú sunnudagin verður orsøk til, at FCK ikki vinnur í Herfølge!

Dysturin ímillum Herfølge og FCK verður spældur sunnudagin klokkan 16 føroyska tíð, og hann verður at síggja á TV3+ sjónvarpsrásini.

Herfølge er á næstaftasta plássinum trý stig aftanfyri AB. Akademikararnir hava á pappírinum eina nógv lættari uppgávu sunnudagin, enn teir í Herfølge hava. AB skal spæla ímóti HFK Sønderjylland, sum langt síðani er fokið úr bestu deildini.

# Eingin javnleikur

Sambært hagtølunum, skulu áskoðarar ikki vænta sær nakrar javnleikir, tá dystirnir í fyrstu deild verða leiktir fríggjadagin. Niðanfyri síggjast hagtølini fyri fimm tey seinastu árini, og sambært hesum eru eingir av innanhýsis dystunum millum mótstøðulini endaðir javnir hesi árini

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HB-GÍ | 5-0 | 2-0 | 3-0 | 2-0 | 3-2 | 5-0-0 | 15-2 |
| VB-KÍ | 1-0 | 2-1 | 0-4 | 1-0 | 0-2 | 3-0-2 | 4-7 |
| NSÍ-B68 | 3-0 | 4-1 | 4-1 | 2-1 | - | 4-0-0 | 13-3 |
| B71-FSV | 3-0 | - | - | 1-0 | 2-1 | 3-0-0 | 6-1 |
| EB/S-B36 | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |

gult13 cyan13 magenta13 svart13



# Sjakalurin




*Bruce Willis hevur høvuðsleiklutin sum tann kendi yvirgangsmaðurin, Sjakalurin. Hann fær ta uppgávu at taka lívið av einum persóni í amerikansku stjørnini, men ikki er greitt, hvør hesin er.*
*Avtalan er, at Sjakalurin fær 70 milliónir dollarar fyri hesa uppgávuna. Helmingin áðrenn og hin helmingin aftaná. Sjakalurin kundi tikið helmingin og sloppið sær burtur, men honum dámar væl at jagstra sítt offur og drepa tað.*

# We are not amused!

*Annika Sølvará ummælir:*



Viðgerðin av eini rúgvu av málum í løgtinginum, áðrenn tinglimirnir fáa summarfrí, hevur sett sín dám á tíðindaflutningin alla vikuna. Kjakið frá løgtinginum verður sent beinleiðis í SVF, tá sendingar ikki eru á skránni. Hetta er sera áhugavert at fylgja, ja hesa vikuna er tað her, eg havi fingið mest burturúr SVF. Fríggjadagin, tá tingsetan endaði vildi eg fegin havt, at tað vóru myndir eisini, tá mentamálaráðharrin aftur tók munnin ov fullan. Í arbeiðstíð fáa vit bestu bitarnar borðreiddar í ÚF á miðdegi. Eg havi hoyrt um fleiri, sum fingu breyðbitan í rangastrúpan, tá ÚF endurtók brot úr røðuni hjá mentamálaráðharranum. Nógv kann sigast um hann, men farvuleysur er hann ikki. At kalla ein høgtstandandi embætismann fyri gemenan, um tað so er bókhaldari ella okkurt annað, kann skapa so nógvan mótvind, at tað helst verður ringt at fóta sær hjá skiparanum, hóast hann er í góðari venjing.

### Frískar kreftir

Nú uppskotið til kringvarpslóg varð tikið aftur, hevur Mentamálastýrið boðað frá, at søkt verður eftir nýggjum stjóra til SVF. Tað er uppá tíðina, tí SVF trongir so hjartaliga til nýggjar, raskar kreftir, sum kunnu lyfta støðið uppaftur úr tí aldudali, sum tað eftir mínum tykki er í beint nú. Senditíðin við føroyskum tilfari seinastu vikuna var bert 11,5 % av samlaðu senditíðini, tá endursendingarnar, Globus og Grannar Okkara eru roknaðar frá. 5 tímar og 35 minuttir við tilfari, sum SVF hevur gjørt. 1 t.20 m. guðstænasta og andakt, 1 t. 20 m. Gekkur, 1 t. Dagur og Vika, 40 m. Svf um Svf, 30 m. mentanarsending, 30 m. barnasending og 15 m. tíðindir fyri deyv. Sum Victoria drotning segði á sinni: We are not amused! Eg havi sagt tað fyrr, men má siga tað aftur: Tað líkist ongum at senda Gekkin hvørt einasta fríggjakvøld í bestu senditíð. Onki undirhaldsvirði er í sendingini, sum einans hevur til endamáls at skaffa pengar til SVF. Mín áheitan á komandi sjónvarpsstjóran er at fáa eina góða undirhaldssending aftaná Dag og Viku fríggjakvøld, fáa eina langa tíðindasending sunnukvøld og tíðinda- ella kjaksendingar hvørt gerandiskvøld. Røkkur verandi játtan ikki, so spar onkrar útlendskar sendingar burtur, ger eina betri innsavningarsending ella bið um hægri játtan frá Løgtinginum.

### Havnin skal frelsast

Tá eg hevði lisið greinina hjá hampamanninum Ívari Iversen í Sosialinum leygardagin um Lindina, setti eg mær fyri at royna at lurta eftir eini heilari sending, fyri at vita, um tað veruliga er so livandi galið, sum hann sigur frá. Tíverri má eg siga, at Ívar hevur púra rætt. Týskvøldið var sending við heitinum Spyr Harran fyrst. Áðrenn sjálv sendingin byrjaði, manaði ein ungur um, at Havnin má frelsast, at vit skulu biðja fyri Havnini o.s.f. Hárini reistust á nakkanum, men eg beit tennirnar saman og setti meg at lurta. Endamálið við sendingini, har tríggir prædikantar vóru í útvarpsstovuni, var at svara spurningum frá lurtarum. Skiftivís prædikaðu teir um devulin, sum hevur skyldina av sjúku og sjálvmorðum. Teir undirbygdu við skriftstaði eftir skriftstaði, sum var tað juridiskur tekstur teir sótu við. Aftanfyri var murran, sum ljóðaði sum: amen, halleluja, ja, jesus. Har sótu vaksnir menn og søgdu, at tað er devulin, sum ger at fólk verða sjúk og fáa sjálvmorðstankar, ja ein er enntá lækni.

Slíkt fái eg ikki tikið í álvara. Eg kann sjálvandi gera, sum eg havi gjørt higartil, lata verða við at lurta eftir Lindini. Hinvegin so kann eg ikki lata verða við at hugsa um, at tað uttan iva eru nógv fólk, sum taka slíkt í fullum álvara. Hvussu ber tað til, at vit kunnu hava so ymiska fatan av innihaldinum í somu bók. Hjá mær nyttar í øllum førum ikki at spyrja teir á Lindini, hóast teir beinleiðis søgdu at: "Ogur hava svarið"

### Urtagarðurin dregur

Farna vikan hevur ikki verið nakað stórt upplivilsi, tá eg renni ígjøgnum skránna fyri útvarp og sjónvarp. Kanska er tað árstíðin, sum ávirkar miðlarnar. Ella eri tað eg, sum ikki havi bindindi til at verða inni, tá sólin so smátt er farin at hita moldina uttanfyri. Eg brúki flestu fríløturnar í urtagarðinum, ella urtapottinum uttanfyri, sum onkur skemtiliga tók til um stykkið hjá okkum. Tað var kanska eitt hugskot til sending ella til tema í morgunsendingini at tosa við plantukøn fólk um, hvat eigur at verða hugsað um og gjørt í urtagørðunum beint nú. Eitt innslag hvørja viku um nær tað skal sáast, sláast, veltast o.s.f. SVF kann enntá fara aftur í bandasavnið og finna fram eina røð av sendingum um urtagarðar, sum var gjørd fyri nøkrum árum síðani við Siggu Rasmussen og Birgit Arge. Tað hevði verið nakað, ivaleyst mong við mær vildu sæð og hoyrt. Um ikki, so skal eg nokk fáa nóg mikið av rabarbum til greyt og súltutoy kortini.

## FM í svimjing




## Basalt




## Fanget i Amazonas




## Skadestuen

